Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Próvtøkur á Tekniska Skúla

**Fríggjadagin 19. desember fingu rørsmiðir, húsasmiðir, elektrikarar og maskinsmiðir prógv á Tekniska Skúla í Havn.**



***Rørsmiðirnir sum fingu prógv vóru:*** *Christian P. Djurhuus, Tórshavn, læripláss: Sp/f Hans Dam í Hoyvík, Erik Jespersen, Tórshavn, læripláss: P/F Maria Poulsen & Co.í Tórshavn, Eyðstein Vágfjall, Klaksvík, læripláss: Sp/f Victor á Lakjuni í Klaksvík, Heðin Wenningsted, Hvalvík, læripláss: Sp/f Hans Dam í Hoyvík.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



***Húsasmiðirnir sum fingu prógv vóru:*** *Fróði Benjaminsen, Strendur, læripláss: Sp/f Haldur Vang á Toftum, Jógvan Andr. á Brúnni, Fuglafjørður, læripláss: Svenn Olsen í Syðrugøtu, Poul Heri Hansen, Nes, læripláss: Hans J. Hansen Byggivirki á Nesi, Suni í Hørg, Sumba, læripláss: Mortan Petersen (y) á Tvøroyri, Poul Ólason Johannesen, Fuglafjørður, læripláss: Finnur Simonsen á Argjum, Hjalmar S. Juul, Oyndarfjørður, læripláss: JLJ-Bygging í Oyndarfirði, Tóroddur Vang, Glyvrar, læripláss: TN-Bygging á Glyvrum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



***Elektrikararnir sum fingu prógv vóru:*** *Magni Dam, Norðskáli, læripláss: Sunda El á Oyri, Kenneth Gaardlykke, Miðvágur, læripláss: Sp/f Thorfinn Nielsen í Miðvági, Fríði Smith Hammer, Rituvík, læripláss: Sp/f El-Talvuvirkið í Norðragøtu, Oystan Jensen, Sørvágur, læripláss: P/f Tórshavnar Skipasmiðja, Símun Kerá, Hellurnar, læripláss: Sp/f El-Teknik í Leirvík, Kristian Madsen, Kollafjørður, læripláss: Petur F. Joensen á Eiði, Kim Johan Petersen, Tórshavn, læripláss: Tummas Eli Hansen í Hoyvík, Sjúrður í Skemmuni, Saltangará, læripláss: El-Service á Skála*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



***Maskinsmiðirnir sum fingu prógv vóru:*** *Hans J. Falkvard, Sørvágur, læripláss: P/F J.K. Joensen & Sonur í Miðvági, Jákup J. Fonsdal, Vestmanna, læripláss: P/F Tórshavnar Skipasmiðja, Brian í Gong, Tórshavn, læripláss: Tórshavnar Skipasmiðja, Óli Súni Hansen, Oyndarfjørður, læripláss: P/F Skipasmiðjan á Skála, Helgi Johansen, Tórshavn, Tórshavn, læripláss: P/F Noma Tek í Tórshavn, Rodmund P. Johannesen, Miðvágur, læripláss: P/F J.K. Joensen & Sonur í Miðvági, Poul Dan Kjærbo, Vágur, læripláss: Sp/f Vágs Skipasmiðja, Kristmund Rói Nielsen, Sandur, læripláss: P/F Tórshavnar Skipasmiðja, Kristoffur Nielsen, Strendur, læripláss: P/F Mekanik í Runavík, Jákup Poulsen, Tórshavn, læripláss: P/F Tórshavnar Skipasmiðja, Kim Poulsen, Miðvágur, læripláss: P/F J.K. Joensen & Sonur í Miðvági, Esmar Sørensen, Trongisvágur, læripláss: P/F Bærendsen´s Teknik á Tvøroyri. Vantar á myndini: Rúni í Jansagerði, Miðvágur, læripláss: P/F J.K. Joensen & Sonur í Miðvági.*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Próvtøkur á Maskinmeistaraskúlanum

**Fríggjadagin 19. desember var próvtøka á Maskinmeistaraskúlanum har maskinistar og maskinmeistarar fingu prógv.**



*Maskinistarnir sum fingu prógv vóru: Kári Christiansen, Fuglafjørður, Jan Gaardbo, Toftir, Hjarnar Gudmundsen, Sandavágur, Poul Henning Jacobsen, Syðrugøta, Fróði Jógvansson, Innan Glyvur, Suni E. Justinussen, Leirvík, Heðin á Lakjuni, Klaksvík, Heini Midjord, Tórshavn, Fróði Mortensen, Tórshavn, William Olsen, Skáli, Fríðbjørn Seloy, Vestmanna, Poul Nolsøe Sørensen, Norðragøta, og Bárður Wilhelmsen, Vestmanna. Líggjas S. Hansen, Runavík, vantar á myndini.*

*Virðislønir: Suni Justinussen fekk kikara frá Føroya Sparikassa, og William Olsen og Fróði Mortensen fingu klokku frá P/F Trygd*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Maskinmeistarar sum fingu prógv vóru: Jan Heinesen, Norðragøta, Jan Jacobsen, Tórshavn, Reidar Kirke, Saltnes, Birgir Petersen, Kambsdalur, Eyðstein Rasmussen, Sørvágur, Búgvi Vang, Fuglafjørður, og Bogi Winther, Kirkjubø.*

*Virðislønir: Jan Heinesen og Birgir Petersen fingu fototól frá Føroya Banka, Jan Jacobsen og Reidar Kirke fingu mátitól frá Maskinmeistarafelagnum, og Bogi Winther fekk íðnisvirðisløn (flidspræmie) frá A.P.Møller.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Dagurin

**31. desember. Sylvester,** deyður í 335. Pávi, sum sigst at hava doypt fyrsta kristna keisaran Konstantin Mikla. Sylvester var tann pávin, sum fór undir at byggja Pæturskirkjuna.

Dagurin er *nýggjársaftan* og verður eisini róptur *gamlaárskvøld*.

Jón Fríðrik Kjølbro:

# Landsdómari við Eystara Landsrætt

16. januar 2004 tekur Jón Fríðrik 6Kjølbro, løgfrøðingur, við sum landsdómari við Eystara Landsrætt í Keypmannahavn.

Jón er 36 ára gamal og klaksvíkingur, sonur Alvdis, f. Sørensen, ættað úr Kunoy, og Jógvan F. Kjølbro, úr Klaksvík. Hann flutti sum smádrongur til Keypmannahavnar at búgva og er uppvaksin har.

Hann byrjaði at lesa til løgfrøðing í 1987 og var liðugur í 1992. Meðan hann las, arbeiddi hann í danska løgmálaráðnum sum studentur, og tá hann varð liðugur, fekk hann starv sum fulltrúi har. Samstundis hevði hann til uppgávu at møta sum ákæri fyri politistjóran í Keypmannahavn.

Frá 1994-96 arbeiddi Jón sum dómarafulltrúi hjá Sorinskrivaranum í Havn.

Eftir tað fór hann aftur í starv hjá danska løgmálaráðnum og byrjaði á lógardeildini, har høvuðsuppgávan hjá honum var ES-rættur og mannarættindi. Eisini var hann



hjálpari hjá statsadvokatinum og møtti sum ákæri í landsrættinum.

Í 2001 fekk hann starv sum høvuðsráðgevi í lógardeldini hjá Løgmálaráðnum við ábyrgd fyri mannarættindum. Í hesum starvi var hann ráðgevi hjá teimum ymisku ráðharrunum í donsku stjórnini í mannarættindamálum. Hann hevur umboðað Løgmálaráðið bæði innan- og uttanríkis. Eisini hevur hann undirvíst dómarum og øðrum embætisfólki. Hann hevur eisini undirvíst í Føroyum.

Nú hann tekur við sum landsdómari við Eystara Landsrætt, hevur hann farloyvi frá Løgmálaráðnum í tvey ár.

Jón leggur serligan dent á at hann sum trúgvandi í sínum arbeiði, og í øllum tí sum hann ger hevur eitt vers í Kolossebrævinum 23,3 fyri eyga, har stendur "Hvat tit so gera, gerið tað av hjarta, sum fyri Harran"

Jón er giftur við Guðrun, dóttir Judith og Osvald Kjærbo í Havn, tey eiga tríggjar synir: Kristian 11 ár, Jóhan Fríðrik 10 ár, og Andrias Fríðrik 6 ár.

Familjan býr í Glostrup og koma nógv saman við øðrum føroyingum. Tey koma í eina samkomu har sum nógvir føroyingar eisini ganga.